

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 10 - 2011

# ES skal ikki áleggja Noregi krøv

Tað er fallið norsku myndugleikunum fyri bróstið, at ES-nevndin er komin við einum uppskoti um at skerpa trygdar-, heilsu- og umhvørviskrøvini innan oljuvinnuna í øllum londum í Evropa. -Tað er eingin orsøk til, at ES skal leggja seg út í heilsu-, umhvørvis- og trygdarreglurnar innan oljuvinnuna í orskum øki, sigur norski olju- og orkumálaráðharrin, Ola Borten Moe. ES-nevndin vil vera við, at vandin fyri einari stórvanlukku í evropeiska oljuídnaðinum er alt ov stórur, men sambært norska ráðharranum er hetta ikki galdandi fyri tað norska økið. Hann vísir á, at norðmenn hava ment sínar skipanir ígjøgnum 40 ár. -Sjálvandi er okkurt, sum kann gerast betur, men tað er umráðandi, at vit stýra tí sjálvir, sigur Ola Borten Moe við Aftenbladet. Sjálvur stúrir hann fyri, at ein skipan sum tann, ið ES-nevndin mælir til, fer at hava nógva umsiting við sær, og harafturat verður hon dýr. Í uppskotinum mælir ES-nevndin eisini til at gera ein ávísan skilnað ímillum leitiloyvi og framleiðsluloyvi og at broyta ábyrgdarbýtið millum operatørin og hini feløgini, men eisini hesum er norski ráðharrin ímóti, og hann ger púra greitt, at ein møgulig ES-lóg um hesi viðurskifti bindur ikki Noreg. Orkukommiserurin hjá ES, Gunther Oettinger, sum júst hevur verið í Noregi, sigur við Aftenbladet, at ES fer sjálvandi at lurta eftir Noregi í hesum máli, men at Noreg má eisini lurta eftir ES. Sjálvur væntar hann ikki, at tann ætlaða skipanin verður tung at umsita, og hon verður heldur ikki dýr, sigur hann við blaðið.